

## Lyngby misti stig á heimavølli

Tað eydnaðist ikki Lyngby at vinna dystin ímóti Næstved í donsku 1. deild í sólskininum á Lyngby Stadion sunnudagin. Dysturin endaði við javnleiki 1-1, og hetta var fyrstu ferð í hesum kappingarárinum, at Lyngby ikki vann heimadyst. Næstved stóð seg væl, teir stríddust væl og komu á odda. Lyngby javnaði, men kláraði ikki at vinna dystin. Christian Lamhauge Holst spældi ikki við hjá Lyngby, tí hann er skaddur. Lyngby liggur nú nummar 2 í donsku 1. deild.

## FCK vann á Brøndby

Stóri dysturin í donsku superliguni millum FCK og Brøndby var á skránni í gjár. Eitt mál kom í dystinum, og tað gjørdist svenski álopsspælarin hjá FCK Fredrik Berglund. Verjuspælarin Mark Howard hjá Brøndby fekk seinna gula kortið longu í fyrra hálvleiki, og eftir útvísingina hevði FCK greiða yvirvág í dystinum. Fyrsta hálva tíman var dysturin javnur, og bæði liðini høvdu royndir á málið. FCK liggur nú á odda í superliguni.

ÍF-B68 2-3 (1-1):

# Tað var meira krút í B68




ÍF

B68

*Toftamenn fegnaðust, og fuglfirðingar iðraðu seg eftir botnbrakið í Fuglafirði sunnudagin*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Tá ið tað í seinna hálvleiki kom til skarpskeringar í botnstríðnum, var tað B68 hevði meira tyngd og størri yvirskot, og tí vunnu toftamenn týðandi dystin í Fuglafirði**

**ÍF-B68**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

B68 tók sunnudagin eitt stórt fet nærri Formuladeildini 2007, tá ið liðið vann botndystin ímóti ÍF, sum annars veruliga hevur havt undanvind seinastu umføríni.

Dysturin í Fuglafirði varð lívligur, dramatiskur, spennandi og undirhaldandi. Spælið var langt frá altíð pent og polerað, men hvussu kann ein dystur um lív ella deyð verða tað. ÍF spældi heldur betur – serliga í fyrra hálvleiki – men viljin og stríðshugurin hjá B68 gjørdist avgerandi í seinna hálvleiki, tá ið dysturin veruliga lá og ridlaði.

### Nógv ferð

B68 legði betur fyri, og tað vóru ikki meira enn átta minuttir farnir, tá ið toppskjúttin hjá toftamonnum, Súni Fríð Barbá, hevði gjørt um seg fyrstu ferð. Fleiri spælarar lógu fram við í brotsteignum hjá, bólturin endaði at enda hjá Súna Fríða, sum tamdi við bringuni og sendi flatt í ÍF-málið til 1-0 til B68.

ÍF svaraði aftur um miðjan fyrra hálvleik. Hesa løtuna hevði heimaliðið yvirtakið í dystinum, og tað var uppiborið, at teir javnaðu. Høgni Zachariasen smekkaði til úti frá, skotið varð blokerað, bólturin endaði aftur hjá Høgna, sum síðani dró inn í brotsteigin og legði upp á tvørs. Har var Hanus Eliasen fyrstur á og sneiddi bóltin í málið til 1-1.

Fyrri hálvleikur sera lívligur. Spælaranir stríddust við lív og sál, og ferðin á spælinum var høg. Stundum var ferðin ov høg, og hvørki av liðunum kláraði at kontrollera dystin ella ferðina.

Alexander Jovevic var virkin á ÍF-miðvøllinum, og Hanus Eliasen skapti vanda, men tað var veteranurin í B68-verjuni Øssur Hansen, sum var bestur spælari á vøllinum tann góða tíman, beinini hjá honum hildu.

### Bæði skoraðu aftur

Liðini løgdu til brots aftur í seinna hálvleiki, og so hvørt sum tíðin gekk, gjørdist dysturin meira opin, tí liðini móddust, og tá vóru tað, at profilarnir hjá liðunum slóu til.

Tá ið ein lítil tími var spældur, legði B68 seg á odda eftir hornaspark. Julian Johnsson fekk høvdið á, og so var Kristian Anton Andreasen fyrstur á leysa bóltin og sendi í málið. Júst Kristian Anton, sum støðugt royndi at bróta ígjøgnum, gjørdist avgerandi løtu seinni.

ÍF svaraði aftur beinanvegin, og ein minutt aftan á javnaði miðvallarin Høgni Zachariasen, eftir at Frank Poulsen hevði sent innfyri úr høgru. Høgni tveitti seg niður í bóltin og stútaði hann í málið til 2-2.

### Avgerðin fall

Eftir hetta var dysturin opin eina løtu, og tað var nú, at tað veruliga kom til skerpskeringar millum tey bæði Eysturoyarliðini. Her vísti tað seg, at B68 hevði størri yvirskot, og teir drógu sigurin heim.

Avgerandi málið skoraði Súni Fríði Barbá, men tað var eftir frálíkt upplegg frá Kristian Anton Andreasen. Hann spældi í høgru síðu, men fór eina løtu yvir í vinstru, og fór hann fram við tveimum spælarum, áðrenn hann við baklinjuna sendi eitt gott innlegg innfyri málið. Har rann Súni Fríði í bóltin og sparkaði hann í málið til 3-2.

Eftir hetta fall ÍF í fátt, og seinasta lítla korterið av dystinum megnaði ÍF ongantíð at skapa veruligan vanda í B68-brotsteignum. Innskifti Árni Petersen varð fluttur úr verjuni og fram á álopið, men bólturin kom sjáldan fram.

Harvið vann B68 dystin 3-2, og teir liggja nú best fyri í botnstríðnum við ÍF og VB/Sumba, sum bæði liggja tvey stig aftanfyri B68, nú tveir dystir eru eftir at spæla.

## Einki er avgjørt enn

Hóast B68 í gjár tók seg tvey stig fram um hini bæði botnliðini, so fáast teir ikki at staðfesta, at teir nú yvirliva í Formuladeildini.

– Tað eru framvegis tveir dystir eftir at spæla, og tí er einki avgjørt. Vit kunnu avgera okkara lagnu sjálvir eftir sigurin í dag, men vit eru ikki tryggjaðir enn, segði Súni Fríði Barbá, sum gjørdi tvey av týdningarmiklu málunum hjá B68.

Hanus Eliasen, sum var annars málskjúttin á heimaliðnum, vildi heldur ikki viðurkenna, at ÍF nú er á veg niður í næstbestu deildina.

– Tað sær ikki gott út hjá okkum, men vit mugu gera alt, sum vit kunna í teimum báðum seinastu dystunum. Vit hava framvegis ein møguleika, og um vit vinna báðar dystirnar, so rokni eg við, at vit klára at yvirliva, segði Hanus Eliasen.

## Gott dómaraavrik

Leirvíkingurin Petur Reinert skuldi halda skil á, tá ið toftamenn og fuglfirðingar í gjár spældu avgerandi botndyst í Fuglafirði, og ta uppgávuna loysti næsti føroyski FIFA-dómarin til reint ug. Víst var okkurt ivamál um hendinga innkast ella fríspark, men samanumtikið var dómaraavrikið av besta slagi. Petur veitraði seks ferðir við gula kortinum, men hann kláraði at stýra lagnudystinum, uttan at nakað rok kom í ella nakar spælari var vístur av vøllinum.